Undir liðina á ÍF

Óansæð, um Mjølnir ella SÍ vinnur steypafinaluna hjá monnum í morgin, kemur vinnandi liðið upp á síðuna av ÍF, sum oftast hevur vunnið. ÍF hevur vunnið fýra ferðir, meðan Mjølnir og SÍ eiga tríggjar sigrar í part. Fleyr hevur tvær ferðir verið í finaluni, men tapt báðar ferðir.

Annað er altíð við

Síðani farið var undir at spæla steypafinalur í flogbólti, hava annaðhvørt Mjølnir ella SÍ verið við í mansfinaluni hvørja einastu ferð. Liðini hava spælt seks finalur í part, og hetta er triðju ferð, at tey møtast. Báðar tær fyrru ferðirnar, í 2005 og 2008, vann SÍ.

Her kann alt henda

Stigatalvan í landskappingini fortelur, at tað eru tvey sera jøvn lið, ið møtast í steypafinaluni hjá monnum. Tey eru fremst í Eikliguni við bara einum stigi á muni, og hartil hava tey bæði spælt javnar dystir og smurt hvørt annað av

Hilmar Jan Hansen

Sjáldan man tað hava verið meira opið, hvat kann henda í einari mansfinalu í flogbólti, enn hesa ferð. Skulu vit ganga út frá úrslitunum millum Mjølnir og SÍ í landskappingini í vetur, so kann tað vera alt frá 3-0 sigri til annað liðið til ein fimmsettara, sum annað vinnur 3-2. Og stórt betri fær tað neyvan verið undan einari finalu!

Liðformaðurin hjá Mjølnir, 23 ára gamli Thorvald Danielsen, sigur, at teir í Mjølnir gleða seg til finaluna, og av tí at felagið er eitt av teimum, ið hevur verið í fremstu røð í flogbólti í mong harrans ár, er stórur spenningur eisini í Klaksvík og Norðoyggjum annars.

– Fólk eru spent og gleða seg, og eg væntí, at vit fáa nakrar góðar áskoðarar við okkum. Her verður skipað fyri ókeypis bussferð, so vit vænta okkum góðan stuðul. Hetta eru eisini tvey rættiliga jøvn lið, sum kenna hvønnannan væl, so hetta er ein torførur dystur at spæla. Tí vóna vit, at vit fáa góðan stuðul frá áskoðarunum, sigur Thorvald, sum – hóast jøvn lið – sær onkran mun á Mjølnir og SÍ.

– Styrkin hjá teimum er serliga tað góða verjuspælið, tí teir fáa nógv uppaftur. Hinvegin liggur okkara styrki helst meira í álopsspælinum, og tann partin hava vit styrkt, nú vit hava fingið Jón Nielsen við okkum. Eg væntí, at hann kann koma at avgera nógvar bóltar fyri okkum.

Við í báðum

Tá tað kemur til verjuspælið hjá SÍ, sum Thorvald nevnir, slepst neyvan undan at nevna 24 ára gamla Johan Petur á Stongum, sum spælir libero og gjarna gongur undan, tá bóltarnir skulu fáast uppaftur. Hann væntar eisini ein javnan finaludyst ímóti Mjølnir.

– Einki av liðunum stórfavorittur, tí tey eru so jøvn. Vit skulu serliga ansa eftir Boban Ilic og Jón Syderbø, tí teir báðir eru størsta hóttanin frá Mjølnir. Hinvegin er styrkin hjá okkum, at vit hava eina ótrúliga breidd – serliga í álopsspælinum, sigur Johan Petur, sum ikki bara skal spæla við í mansfinaluni, tí hann hevur sum venjari hjá SÍ-kvinnunum eisini sítt at síggja til í kvinnfinaluni.

Hann sigur, at fólkið í Sørvági gongur høgt upp í flogbóltin og ikki minst steypafinalurnar. – Tað hevur jú nógv at siga fyri bygdina og kommununa, at Sørvágur er nógv frammi í miðlunum, og øll standa saman um SÍ. Fólk eru spent og spyrja nógv, hvat vit vænta okkum, hvussu tað verður og sovorðið, og vit vita, at ein stór fjøld kemur til Havnar at stuðla okkum, sigur Johan Petur.

Má verða í moll

Vit spurdu eisini Thorvald Danielsen, hvussu hann heldur, at ein steypafinala skal vinnast: – Har er fyrst og fremst galdandi, at tú skalt tora at spæla og hava viljan at vinna, samstundis sum tú spælir so gott sum gjørligt. Vit fokusera fult og heilt á uppgávuna og eru øgiliga spentir at spæla finaluna, sigur hann, sum fær viðhald frá Johan Petur:

– Tú ert ongantíð nøgdur við at tapa, so vit fara sjálvandi eftir at vinna báðar finalurnar. Bæði lið eru greið yvir, at spæla tey upp til sítt besta, so hava vit møguleikan at vinna báðar. Men skuldi tað kiksað, so má SÍ-dansurin um kvøldið bara vera í moll, skemtar sørvingurin.

Hvussu er og ikki, so eru tað tvey av teimum royndastu steypaliðunum, ið møtast í morgin. SÍ er í mansfinaluni triðja árið á rað, og undan tí var Mjølnir við tríggjar ferðir á rað. So fæst at síggja, um Vágar eisini skulu eiga steypavinnaran hjá monnum, ella um Klaksvíkin fer allan vegin upp á tindin.

Steypafinalur hjá monnum 2000-2009

Ár	Lið	Úrslit	Settúrslit
2000	Mjølnir-Fleyr	2-1	(21-17, 15-21, 7-2) (16-21, 20-22) (15-10) *)
2001	ÍF-Mjølnir	3-0	25-17, 25-20, 25-15
2002	SÍ-ÍF	3-0	25-15, 26-24, 25-14
2003	ÍF-SÍ	3-2	25-21, 23-25, 25-16, 21-25, 15-13
2004	ÍF-SÍ	3-0	25-17, 25-22, 25-20
2005	SÍ-Mjølnir	3-0	25-18, 25-18, 25-23
2006	Mjølnir-Fleyr	3-0	25-22, 26-24, 25-23
2007	Mjølnir-ÍF	3-0	25-16, 25-21, 25-15
2008	SÍ-Mjølnir	3-1	26-24, 25-13, 18-25, 26-24
2009	ÍF-SÍ	3-1	25-22, 21-25, 25-17, 25-19

Dystirnir millum Mjølnir og SÍ í vetur eru bæði endaðir við 3-0 sigrum til bæði liðini og fimmsettarum, so roknast kann við einari javnari og spennandi mansfinalu, har alt kann henda

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

MJØLNIR KLAKSVÍK

Nr.	Navn	Aldur	Hædd	Leikpláss	Landsdystir	
1	Eystein Eltur	35	182	Libero	5	Føroyar
2	Bogi Isaksen	34	181	Hevari	10	Føroyar
3	Jón Nielsen	29	191	Kantur	30	Føroyar
4	Bárður Vennerd	21	187	Miða	0	Føroyar
5	Boban Ilic	34	192	Kantur	25	[illegible]
6	Thorvald Danielsen	23	192	Hevari	15	Føroyar
8	Hanni Niclasen	22	173	Kantur	0	Føroyar
9	Jón Syderbø	33	180	Kantur	0	Føroyar
10	Jóannes Poulsen	43	185	Miða/Kantur	14	Føroyar
11	Hjalti Josephsen	31	192	Miða	10	Føroyar
12	Sæmund Kalsø	18	182	Kantur	0	Føroyar
13	Rasmus Purkhús	21	185	Miða	0	Føroyar

Liðformaður: Thorvald Danielsen
Venjari: Boban Ilic
Hjálparvenjari: Trygvi Poulsen
Fysioterapeut: Hedevig Mattas

SÍ SØRVÁGUR

Nr.	Navn	Aldur	Hædd	Leikpláss	Landsdystir	
1	Finn Ingi Falkvard	20	187	Kant./diag.	0	Føroyar
3	Ólavur Jensen	25	177	Hevari	0	Føroyar
4	Rajko Petrovic	37	200	Kantur	0	Serbia
5	Jón Falkvard	29	187	Miðja	10	Føroyar
6	Jákup Hansen	17	175	Libero	0	Føroyar
7	Ingi Ole-Jacobsen	22	187	Miðja	0	Føroyar
8	Jóhan Petur á Stongum	24	178	Libero	33	Føroyar
9	Jón Joensen	25	185	Diag./kant.	8	Føroyar
10	Ragnar í Haraldstovu	32	200	Diagonal	[illegible]	Føroyar
11	Sonni Zachariasen	19	170	Hevari	0	Føroyar
12	Filip Gram	20	189	Miðja	0	Føroyar
13	Emil Mikkelsen	20	188	Kant./diag.	0	Føroyar
15	Martin Mikkelsen	18	193	Miðja	0	Føroyar
16	Kári Mikkelsen	24	179	Kantur	0	Føroyar

Liðformaður: Jón Joensen
Venjari: Ragnar í Haraldstovu
Hjálparvenjari: Jákup av Kák
Liðleiðari: Elias Davidsen